## Høvdavirkið á føroyskum hondum

Høvdavirkið í Leirvík er nú á føroyskum hondum, eftir at størsti føroyski partaeigarin hevur keypt ognarpartin hjá tveimum íslendskum fyritøkum, sum higartil hava átt helvtina av virkinum. Høvdavirkið hevur havt sunnan rakstur, síðan tað varð sett á stovn í 2001, og virkið markeraði eisini eitt nýbrot í føroyskum vinnulívi í sambandi við gagnnýtslu av fiskaúrdráttum. Hetta hevði við sær, at fyritøkan í 2005 fekk heiðurin sum ársins virki í Føroyum. Tað er smápartafelagið H. Konoy, ið áður átti eina slaka helvt av partapeninginum, sum hevur keypt partapeningin frá teimum báðum íslendsku fyritøkunum og einum minni føroyskum íleggjara, soleiðis at H. Konoy nú eigur hundrað prosent av partapeninginum í Faroe Marine Products. Á Høvdavirkinum starvast umleið seksti fólk, og høvuðsvirksemið fevnir um at útflyta turkaðan fisk umfram høvd og ryggir. Stjóri er Eirikur á Húsamørk.



# Skipasmiðjunum vantar 30

**Tað er stórur tørvur á handverkarum í Føroyum. Men hesi tørvur er ikki bara í Føroyum. Í Póllandi, haðani vit hava leigað fleiri handverkarar til føroyskt skipasmið, er eisini trot á arbeiðsmegi, og tí er tað ikki so lætt at fáa pólskar handverkarar higar til lands heldur**

HANDVERK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðum, tá nógv virksemi er í einum landi, er tað ofta handverkaravinnuni, sum tørvar fólk. Nógv bygging er kring landið, og hetta krevur fólk á fleiri økjum, bæði innan betong, timbur, hita og el.

Men tað er ikki bara byggivinnan, sum hevur nógv jørn í eldinum í løtuni. Innan skipasmíð og umvælingararbeiði á smiðjum og maskinverkstøðum er eisini úr at gera.

Og her vantar nógv fólk.

### Vanta 30 mans

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at nógv virksemi er á skipasmiðjuni í Havn, skipasmiðjuni á Skála og á FJM í Runavík, sum samtakið eisini eigur.

- Vit hava nógv at gera á øllum trimum støðunum, og okkum vantar tilsamans einar 30 handverkarar.

Stjórin sigur, at á Skála eru teir í fyrsta lagi í holt við tvey supply-skip, og har er eisini ymiskt umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiði.

- Á skipasmiðjuni í Havn byggja vit tveir alibátar, og her er eisini nógv umvælingar- og viðlíkahaldsvirksemi. Í løtuni standa trý skip á bedingini, Ran, Thor Provider og ein alibátur.

FJM í Runavík er smiðjan, sum í fyrsta lagi arbeiðir við rustfríum stáli.

- Vit hava í løtuni tríggjar mans í Spaniu, sum eru í holt við at seta verksmiðjuna upp umborð á nýbygningunum, sum Beta letur byggja. Verksmiðjan er smíðað á verkstaðnum í Runavík, sum eisini umboðar kryvjimaskinurnar, ið settar verða í skipini. Ætlandi skulu nýggju skipini hjá Beta verða liðug í Spaniu um mánaðarskiftið november/ desember.





*- Tórshavnar Skipasmiðja hevur verið eitt støðugt arbeiðspláss hesi stívliga sjeyti árini, skipasmiðjan hevur verið virkin, og tí hava vit eisini ein góðan "stab" av dugnaligum føroyingum. Men hetta er ikki nóg mikið til alt tað virksemi, sum er, sigur Gunnar Mohr, stjóri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Eisini í Póllandi

Gunnar Mohr sigur, at einir 35-40 pólskir handverkarar eru á Skála, og í Havn eru teir einir 15 í tali.

- Men tað er ikki bara sum at siga tað at fáa útlendskar handverkarar til Føroya at arbeiða. Vit hava góðar royndir av póllendingum gjøgnum mong ár, men í Póllandi er eisini nógv skipasmíð, og haðani er ikki lætt at fáa handverkarar í løtuni.

Stjórin sigur, at póllendingar innflyta arbeiðsmegi

# Bót fyri krabbameinselvandi evni í laksi

**Eitt norskt roykivirki hevur fingið 600.000 krónur í bót fyri at hava brúkt krabbameinselvandi nitrit í síni framleiðslu av roykтum laksi**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Matvøruframleiðarin Haarberg & Lassen í Tróndheimi í Noregi hevur brúkt ólógligt krabbameinselvandi nitrit í síni framleiðslu av royktum laksi.

Herfyri fekk fyritøkan eitt sektaruppskot upp á 600.000 norskar krónur, sum felagið góðtók.

Tað var løgreglan í Syðra-Trønderlag, sum legði uppskotið fyri Haarberg & Lassen, sum nú hevur skift navn til Lerøy Haarberg AS.

Dagligi leiðarin, Torger Haarberg, hevur eisini fingið eina bót upp á 40.000 norskar krónur.

Leiðarin váttar, at fyritøkan hevur tikið við bótini, men hevur annars ongar viðmerkingar til málið.

Tað var norska matvørueftirlitið, sum avdúkaði ólógliga nitritið, og tað er Adresseavisen og Fiskaren, sum bera hesi tíðindi.



*Norska Matvørueftirlitið avdúkaði vandamikið nitrit í royktum laksi*